## FRÀ LUTTAKARA:

“Síðani eg byrjaði at gera fimleik havi eg fingið tað nógv betur - eg orki alt betri. Eg síggji ljósari uppá tað heila, av at vera saman við fólki, sum eru í somu støðu sum eg. Og so er tað hitin, sum er millum okkum øll.”

*Kvinna*

## FRÀ LUTTAKARA:

“Fimleikurin hevur gjørt sera stóran mun kropsliga, og tá fylgir tað sálarliga eisini við positivt.”

*Maður*


**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo


krabbameinsfelagið

# Firvaldar

## Fimleikur fyri øll, sum hava ella hava havt krabbamein og teirra avvarðandi



Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*

21. august 2017



## TVØRFAKLIGT SAMSTARV

Fimleikafelagið Ljósið í Havn, hevur saman við Krabbameinsfelagnum, eitt fimleikalið, ið nevnist Firvaldar. Fimleikurin er fyri øll, sum hava, hava havt ella eru í viðgerð fyri krabbamein, og teirra avvarðandi.

## HVÍ RØRA SEG?

Vit venja konditión, styrki og innaru ró. Ùtgangsstøði verður tikið í hvat hvør einstakur megnar.

Avvarðandi eru vælkomin við at íðka og stuðla, og ynskja vit eisini, at hetta verður eitt gott høvi at uppliva nakað jaligt saman.



Miðvís kropslig venjing eftir sjúku og í sambandi við viðgerð, økir mótstøðuføri.

* Minkar um ”møðina”
* Gott ímóti vaml
* Betrar konditiónina
* Styrkir vøddarnar
* Gevur sálarliga vælveru
* Betrar um lívsgóðskuna

## VENJARI

Venjari er Beinta Malena Sørensen. Beinta er útbúgvin fysioterapeutur. Vant verður fríggjadag kl. 14.00 til 15.00 í fimleikarhøllini FIMI. Har hava vit sera góðar umstøður.

**Tað er ókeypis at luttaka**

Ynskir tú at hoyra nærri um fimleikin ella hevur tú spurningar til tilboðini hjá Krabbameinsfelagnum kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 ella umvegis teldupost kmf@krabbamein.fo

Firvaldar hava ein bólk á Facebook har kunning og annað samskifti fer fram. Bólkurin eitur Firvaldar. Sí https://www.facebook.com/groups/426427107435633/